# Dygdarvørur frá Telebúðunum



PRÍSUR VIÐ MVG **2195,-**

## Ericsson 260 KIT

Tann tráðleysa Ericsson 260 er ein framkomin digital Dect-telefon – formgivin og evnað til at gera lívið meira hugaligt heima. Telefonin hevur "vís nummar", soleiðis at tú sært, hvør ringir og hvør hevur ringt. Eisini hevur hon innbygdan telefonsvarara, sum svarar teimum uppkøllum, tú ikki nært.



PRÍSUR VIÐ MVG **495,-**

## Høvuðssett v/útvarpi til Ericsson fartelefonir

Høvuðsettið hevur innbygt útvarp, soleiðis at tað bæði virkar sum útvarp og høvuðsett. Um tú lurtar eftir útvarpinum, og telefonin ringir, verður útvarpið sjálvvirkandi sløkt og telefonin er klár at svara. Kann brúkast til A1018, T18, T10, R250, PRO, 600, 700 og 800 røðirnar.



PRÍSUR VIÐ MVG **395,-**

## Ericsson CHATBOARD™

CHATBOARD™ - sum er eitt lítið og harðført knappaborð til fartelefonir, ger tað nógv lættari og nógv, nógv skjótari at skriva SMS boð, og telefonboks-knappurin ger tað skjótari at leggja nummur inn í telefonbókina. CHATBOARD™ kann brúkast til telefonirnar T10s, A1018s, T18s, R250s PRO, I888 WORLD, SH888, S868 og GF788e.

**TELEBÚÐIN**

Tórshavn 31 70 10 • Tvøroyri 37 10 00 • Søldarfjørður 44 10 00
Norðurstreymoy 42 10 00 • Klaksvík 45 74 88 • Sandur 36 10 00 • Miðvágur 33 20 00

petur & petur - 320870

# Betri svøvn

## BIOflex magnetviðgerð tí:

- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

**Ring 21 79 16**

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



**Viðgerð, ið virkar ímóti:**

- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

**BIOflex® MAGNET TERAPI**

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916

Sosialurin - 311820





Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flísum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

**Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki**

# Avloysarastarv á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki

er leyst at søkja frá 1. apríl 2000 til 31. oktober 2000. Starvið umfatar umsiting av vinnuskránni og annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarar við HH-prógvi ella royndum innan skrivstovuarbeiði hava fyrimun.

Løn og setanarviðurskifti verða ásett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 8.

Umsóknir saman við prógvum o.ø. verða at senda til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Postboks 3139, 110 Tórshavn í seinasta lagi tann 16. mars 2000.

**Barnagarðurin á Velbastað søkir eftir einum**

# pedagogi

30 tímar um vikuna at byrja 1. apríl.

Eisini verður søkt eftir pedagogum at byrja 1. august ella eftir avtalu. Arbeiðstíð: 30–40 tímar um vikuna.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmálan millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Til starvið, sum verður sett 1. apríl, skulu skrivligar umsóknir vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 20. mars.

Barnagarðurin hevur eina vøggustovu við 10 plássum til børn millum 0 og 3 ár og eina barnagarðsstovu við 20 plássum til børn millum 3 og 8 ár. Opið er frá kl. 7.30 til 17.30.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til barnagarðin.

**Barnagarðurin á Velbastað**
176 Velbastað • tlf. 328121 • fax 328077
teldupostur: velbarn@post.olivant.fo



# Stuðulsfólk

**Stuðulsfólkaskipanin í Tórshavnar kommunu søkir eftir stuðulsfólki 30 tímar um vikuna til ávísa uppgávu.**

**Arbeiði**

Talan er um praktiska / pedagogiska hjálp í einum heimi við tunghoyrdari mammu og 3 hoyrandi børnum. Uppgávan er:

- ✔ Praktisk hjálp í heiminum, so mamman fær meira tíð og møguleika at vera saman við børnunum.
- ✔ Samskiftishjálp, so móðir og børn fáa hjálp til at tosa, hoyra og skilja hvønnannan og læra at samskifta betur sínamillum.

**Arbeiðstíð**

Arbeiðstíðin verður í fyrsta umfari 30 tímar, morgun og kvøld: 7.00-8.30 og 16.30-21.00.

**Førleikakrøv**

Søkt verður eftir einum sjálvstøðugum, vaksnum fólki, íð er fleksibult og hevur lætt við at samskifta. Viðkomandi má vera týðiligur, lættur at skilja, duga at lurta og at reflektera. Tað er neyðugt at seta seg inn í teknmál og at skilja støðuna millum hoyrandi børn og deyv foreldur.

**Setunarviðurskifti**

Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Sum liður í arbeiðnum verður skipað fyri neyðugari supervisión og skeiðvirksemi.

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Herborg N. Debess, í stuðulsfólkaskipanini ella Eyðun Jensen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini tlf. 315160.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. mars 2000. Merk umsóknina "Stuðulsfólk".

# Leiðari

**Søkt verður eftir leiðara til gøtuljósdeildina hjá Tórshavnar kommunu.**

**Starvsøkið**

Starvið fevnir um at leiða og skipa fyri øllum virksemi hjá gøtuljósdeildini og at hava ábyrgdina av teknisku el-installatiónunum, herundir ferðsluljósunum.

**Førleikakrøv**

Tann, ið settur verður í starv, skal vera góðkendur el-installatørur og hava royndir í el-fakinum.

Neyðugt er, at viðkomandi dugir at samstarva og samskifta við aðrar deildir, stovnar og borgarar.

**Setunarviðurskifti**

Starvið verður sett skjótast til ber og verður lønt sambært sáttmálanum við Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Viggo Christiansen, deildarleiðara, ella Boða Haraldson, býarverkfrøðing, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar býráð, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. mars 2000 kl. 12:00. Merk umsóknina "Leiðari".

Tórshavnar kommuna



# 3arin søkir 3 fólk

## Lærling til fotodeild okkara

*Lærutíðin er 3 ár og tú mást hava FHS.*
*Í lærutíðini skalt tú í skúla í Odder í Danmark nakrar ferðir - og tú luttekur eisini í innanhýsis skeiðum hjá okkum.*

**Vit vænta:**

- *At tú helst hevur koyrikort og góðan kunnleika til EDV/KT*
- *Hevur áhuga fyri foto og ert fyrikomandi og ágrýtin*
- *Hevur lætt sinnalag.*

**Vit bjóða:**

- *Løn eftir nærri avtalu*
- *Gott arbeiðsumhvørvi, við einum ungum dynamiskum liði av arbeiðsfelagum.*

## Lærling til fløgudeild okkara

*Lærutíðin er 3 ár og tú mást hava FHS.*
*Í lærutíðini skalt tú í skúla í Danmark nakrar ferðir - og tú luttekur eisini í innanhýsis skeiðum hjá okkum.*

**Vit vænta:**

- *At tú helst hevur koyrikort og góðan kunnleika til EDV/KT*
- *Hevur áhuga fyri tónleiki, tøkni og ert fyrikomandi og ágrýtin*
- *Hevur lætt sinnalag*

**Vit bjóða:**

- *Løn eftir nærri avtalu*
- *Gott arbeiðsumhvørvi, við einum ungum dynamiskum liði av arbeiðsfelagum.*

## Fólk søkist til EDV deild okkara

*3-arin vil fegin hava fatur á tær um tú hevur áhuga at arbeiða saman við einum ungum og dynamiskum liði, har tú fært møguleika at royna eitt sindur av hvørjum innan eina vinnu, ið er í framgongd hvønn dag.*

**Vit vænta at tú ert:**

- *fyrikomandi og smílandi*
- *Tænastuvinarlig/ur*
- *Vælkunnað/ur innan EDV og hardware og hevur hollan kunnleika innan internet*
- *Áhugað/ur innan alt sum eitur software og spøl*
- *Sjálvstøðug/ur*

*3-arin arbeiðir sum eitt lið, men sum samstundis er skapt av einstaklingum, ið fáa møguleika at vísa hvat tey kunna. Vekir hetta tín áhuga, so send eina umsøkn.*

*Hondskrivað umsøkn verður send til okkum* ***innan 20. mars 2000.*** *Størvini skulu setast 01. apríl 2000.*

***3'arin***
***SMS***
***Att.: Gissur Patursson***
***Postboks 1057 - 1058***
***FO 110 Tórshavn***

*SMS • Tel. 31 98 20 - 31 06 06 • Fax 31 49 55*
*E-mail: tryarin@post.olivant.fo*

Sosialurin - 311820

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Mentamáladeildin

# Stuðul til Orðabókagerð

Á fíggjarløgtingslógini 2000 eru kr. 400.000 játtaðar til orðabókagerð.

Tey, ið arbeiða við ella ætla at fara undir at gera orðabøkur, eru vælkomin at søkja.

Umsókn við lýsing av verkætlanini, tíðarætlan, fíggjarætlan fyri verkætlanina og fíggjarætlan fyri 2000 verður at senda til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Postrúm 3279 • 110 Tórshavn**
**Telefon 35 50 50 • Telefax 35 50 55**
**e-postur: umms@umms.fo**

Umsøkjarar eiga at upplýsa føðingardag/V-tal og konto nr. í peningastovni, har møguligur stuðul skal gjaldast á.

Umsóknarfreistin er **týsdagin 7. mars 2000**. Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið.

# Mentunarstuðul

**frá mentunarnevnd Tórshavnar býráðs**

2 ferðir um árið, í mars og september, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða hildin at hava týdning fyri mentunarlív kommununnar.

Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi, luttakara ella persóni.

Meir fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

Umsóknir skulu verða Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 28. mars 2000. Merk umsóknina "Mentunarstuðul".

*Tórshavnar kommuna*



**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820